

# KÍ vil hava UEFA-vøll

**HONDBÓLTUR** Leiðslan í Klaksvíkar Ítróttarfelag vónar, at vøllurin við Djúpumýru verður størri, so hann kann lúka krøvini, sum verða sett einum UEFA-góðkendum fótbóltsvølli

Uni Holm Johannesen

Leiðslan hevur spurt Klaksvíkar kommunu um, at vøllurin verður longdur nakrar metrar oman móti barnagarðinum, og breiðkast so nógv sum tilber.

Ætlanin er eisini at betra um viðurskiftini, skrivar heimasíðan hjá Bláu Bylgjuni.

Klaksvíkar kommuna metti ikki, at hon var før fyri at gera allar íløgurnar komandi fíggjarárar. Tí varð avgerðin at skifta sjálvt teppið til kappingarbyrjan í 2011. Summi fólk hava verið óttafull, tí um vøllurin ikki varð gjørdur, áðrenn teppið kom á, fór tað at taka eini átta til 10 ár, áðrenn klaksvíkingar fingu størri vøll.

Men tað vísir seg, at tað er eingin trupulleiki at leggja teppið á alt fyri eitt, og síðan gera vøllurin longri og breiðari, fyri síðan at flyta linjurnar og sveisa meira teppi uppí.

Tí verður væntað, at KÍ hevur ein UEFA-góðkendan fótbóltsvøll áðrenn kappingarbyrjan í 2013.

## KÍF – H71 22-19 (12-8)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**10 min.: 2-5**
**20 min.: 8-7**
**40 min.: 16-12**
**50 min.: 20-15**

**KÍF:** Andrias Nielsen 6, Arnbjørn Hansen 6, Gert Hansen 4, Rúni Joensen 3, Ási Dam 3.
**H71:** Rúni Højgaard 5, Poul Kjartan Dam 3, Ári J. Olsen 2, Tróndur Vatnhamar 2, Hans Kári Hansen 2, Bogi Krossteig 2, Rógvi Sørensen 1, Bogdan Florea 1, Sigmundur Dahl 1.
**Útvísingar:** KÍF 6 – H71 5

## VÍF – Team Klaksvík 39-16 (16-10)

Dómarar: Kristian Joensen og Karstin Joensen

**10 min.: 6-1**
**20 min.: 13-7**
**40 min.: 24-11**
**50 min.: 32-15**

**VÍF:** Sámal Joensen 8, Bjarti Hansen 7, Jákup S. Andreasen 5, Joen P. Høgnesen 5, Niels Andreasen 4, Andreas Eriksen 2, Jákup A. Joensen 1, Holgar Durhuus 1, Rúni Fossdal 1.
**Team Klaksvík:** Beinur Heðinsson 7, Kristoffur Jacobsen 2, Zarko Pejovic 2, Dánjal Kjærbo 2, Sámal á T. Olsen 1, Vilhelm Vilhelmsen 1, Andrias Ellingsgaard 1.
**Útvísingar:** VÍF 3 – Team Klaksvík 3

*Dysturin millum Stíf og Kyndil, sum skuldi spælast í gjár, varð útsettur*

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 8 | 281 | 210 | 71 | 15 |
| 2 | KÍF | 9 | 262 | 218 | 44 | 15 |
| 3 | VÍF | 9 | 241 | 216 | 25 | 8 |
| 4 | H71 | 8 | 215 | 215 | 0 | 8 |
| 5 | Kyndil | 8 | 202 | 204 | -2 | 8 |
| 6 | StÍF | 7 | 158 | 165 | -7 | 4 |
| 7 | Team Klaksvík | 9 | 196 | 327 | -131 | 0 |



# KÍF hevur kós í finaluna

**HONDBÓLTUR** Kollfirðingar eru sjey stig framman fyri nummar trý í løtuni. KÍF hevur beina kós í finaluna

Uni Holm Johannesen

H71 var á odda 1-5, áðrenn heimaliðið setti ferð á.

KÍF var á odda 7-6, tá 14 minuttir vóru spældir av fyrra hálvleiki. Og so hóttu gestirnir so at siga ongantíð aftur.

Hoyvíkingar runnu aftaná restina av tíðini.

### Arnbjørn og Andrias

Arnbjørn Hansen og Andras Nielsen vóru toppskjúttar hjá KÍF í gjár.

Teir hava spælt væl í hesum kappingarárinum, og aftur hesa ferð prógvaðu teir, at teir eru millum spælararnir, sum fara at ganga undan næstu mánaðirnar.

Teir skutu seks mál hvør.

### Mistu týðandi fet

H71 hevur vunnið seg nærri oddinum seinastu vikurnar.

Hoyvíkingar hava hinvegin tapt dystirnar móti Neistanum og KÍF, og tað hevur kostað teimum dýrt.

Tað eru sjey stig, sum skilja hoyvíkingar og kollfirðingar á stigatalvuni, og tað kann verða torført at vinna inn aftur.

Tað krevur í øllum førum, at H71 vinnur fleiri dystir upp í slag nú.

# Eingin slingur í valsinum

**HONDBÓLTUR** VÍF rann uppflytararnar um koll og nærmast eyðmýkti klaksvíkingarnar, sum framvegis royna at stríðast

Uni Holm Johannesen

Úrslitið sigur alt.

23 mál vóru á muni. 39-16.

Vestmenningar vunnu størsta sigurin í hesum kappingarárinum, tá Team Klaksvík hevði sín mest ússaliga dyst í bestu deildini.

Klaksvíkingar vita, at tað verður trupult hjá teimum at fáa stig í hesum kappingarárinum. Tí er teirra uppgáva at tapa so lítið sum tilber.

Í høllini í Vestmanna í gjár lærdu teir, hvussu tú ikki ber at í bestu føroysku hondbóltskappingini. Uppflytararnir vóru rætt og slætt bukaðir av.

Sámal Joensen er nú tøkur hjá Dia Midjord, venjara hjá VÍF. Landsliðsleikarin hevur verið millum mest eyðsýndu profilarnar í føroyskum hondbólti í fleiri ár. Eydnast tað honum at lyfta seg upp á støðið, hann er gitin fyri, verður hann ein veruligur fongur hjá VÍF, sum skal vinna fleiri dystir upp í slag, um kollfirðingar skulu kenna seg hóttar.

Sámal Joensen skeyt átta mál í gjár.